## Sjúkrarøktarfrøðingur til B7

Á B7 er eitt farloyvisstarv leyst at søkja til setan 1. august 2010 til og við 31. juli 2011 ella eftir avtalu.

Talan er um eitt fulltíðarstarv í skiftandi vaktum, við tænastu innan sergreinina apoplexi.

Møguleiki er fyri lægri brøki.

Deildin er nýumvæld og implementering av THS byrjaði í nov. 2009. Eisini eru vit byrjaði við einum spennandi tvørfakligum átaki, ið inniber um- og samskipan av sjúkrarøkt, viðgerð og uppvenjing av sjúklingum við apoplexi.

B7 er ein medisinsk deild, sum tekur ímóti elektivum og akuttum sjúklingum og hevur vanliga pláss fyri 15 sjúklingum. Sjúkrarøkt og viðgerð er innan hesar sergreinar:

- lungnamedisin
- nefrologi
- hæmatologi
- rheumatologi
- onkologi
- apoplexi

Á B7 er tvørfaklig konferansa hvønn morgun. Tvørfaklig menning við undirvísing og skeiðvirksemi innan serøkini heldur fram.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum**

- sjúkrarøkt og viðgerð til sjúklingar innan áðurnevndu sergreinar
- aktivt luttaka í menningini av sjúkrarøktini á deildini

**Krøv til umsøkjaran**

- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga innan medisinsku sjúkrarøktina
- góð tvørfaklig samstarvsevni
- teldukunnleiki

**Vit kunnu bjóða**

- innleiðslu
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi við nógvum avbjóðingum

Fyrimun hava umsøkjarar við kliniskum royndum innan serøkini á deildini.

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja 304500 til Jónu Sigmundardóttir, deildar- leiðara á B7, lokal 6067, lsjonsi@ls.fo ella Ingun Gaardbo, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, lsingga@ls.fo

Lønar- og setanartreytir smb. sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktar-frøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreistin er 10. juni 2010 kl. 12.00**

Gransking & menning



Trivnaður

Sjúklingurin í miðdeplinum

Størv á Landssjúkrahúsinum



www.ls.fo

Sosialurin / KvR 34 18 00

## Onnur leys størv (sí meira á www.ls.fo)

**Bioanalytikari**
Umsóknarfreistin er 25. mai

**Introduktiónsstarv í Psykiatri**
Umsóknarfreistin er 4. juni

**Yvirlækni til Medisinska Depilin (pædiatri)**
Umsóknarfreistin er 15. juni

**Yvirlæknar í gynækologi/ obstetrik til Skurðdepilin**
Umsóknarfreistin er 25. juni

## Læknaskrivari til Skurðdepilin

Á Skurðdeplinum er eitt fulltíðar farloyvis-starv leyst at søkja til setan 26. juli 2010 og fram til 1. mai 2011 við møguleika fyri leingjan.

Arbeitt verður frá kl. 8-16, umframt 2-3 kvøldvaktir um mánaðin.

**Arbeiðsuppgávurnar fevna m.a. um:**

- móttøku og avgreiðslu av akuttum sjúklingum til skaðastovu/innleggingar
- at skriva skaðastovunotat
- at skriva innleggingarjournalir
- at skriva journalir fyri intensivu deild
- telefonavgreiðslu
- avgreiða læknaváttanir, politiattestir, tryggingarváttanir, skanna skjøl v.m.
- at senda notat o.a til kommunulækna
- ymiska arkivavgreiðslu
- at gera hagtøl

**Førleikakrøv:**

- útbúgving sum læknaskrivari
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- góður røkjuskapur
- góð starvsstarvsevni
- teldukunnleiki

Kunnleiki til Cosmic ein fyrimunur

**Vit kunnu bjóða:**

- sjálvstøðugt og áhugavert starv
- fjølbroyttar arbeiðsuppgávur
- góðar og nýmótans arbeiðsumstøður

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Starvsmanna-felagið og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita við at ringja 304500 til Marnu Gásadal, leið-andi læknaskrivara, lokal 5361 ella Jan J. Poulsen, leiðsluskrivara, lokal 5103.

**Umsóknarfreistin er 11. juni 2010 kl. 12.00**



Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti. Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til: Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn ella við telduposti til umsokn@ls.fo